gult24 cyan24 magenta24 svart24



# Svenskur landsliðsmaður skal verja málið í FCK

**Eingin veruleiki vísti seg at vera í mongu søgunum, sum teir seinastu dagarnar hava verið í fleiri donskum fjølmiðlum**

Tað eru nógvir lutir, sum spæla inn, tá eitt fótbóltsfelag ger av, hvørjar spælarar teir vilja hava at umboða seg. Áhugin er sjálvandi serliga stórur, tá tað ræður um stóru feløgini, har nógvu pengarnir eru at vinna.

Hesar seinastu vikurnar hevur áhugin verið stórur fyri, hvør skal verja málið hjá FCK. Jákup Mikkelsen hevur millum fleiri aðrar verið nevndur. Spurningurin, sum ongantíð verður svaraður, er, um tað hevði verið Jákup Mikkelsen, sum komandi árið hevði verið málverji hjá FCK, um Roy Hodgson framvegis hevði verið venjari har. Í hvussu so er, er tað ein veruleiki, at eingilski venjarin í februar hevði ætlanir um at knýta Jákup at felagnum, men tíverri fyri Jákup, so legði Herfølge fótonglar fyri hesi ætlanini. Nú er sáttmálaskeiðið hjá Jákupi og Herfølge av, men samstundis er Roy Hodgson flogin til Italia.

Svenski Kent Karlsson er venjari í FCK, og á tíðindafundi mánadagin varð almannakunngjørt, at tað verður ein landsmaður hjá venjaranum, sum tey næstu trý árini skal á lønarlistan hjá FCK sum málverji. Maðurin, sum svenski FCK venjarin hevur størst álit á sum málverji, eitur Magnus Kihlstedt.

29 ára gamli málverjin er ikki hvør sum helst. Síðani í 1998 hevur hann verið knýttur at svenska landsliðnum, og higartil hevur hann umboðað føðilandið tíggju ferðir.

Magnus Kihlstedt er keyptur leysur av sáttmála, sum hann hevur havt við norska Brann.

### Hugflogið og veruleikin

Søluhagtølini vísa, at ítróttartilfar er gott tilfar í bløðunum. Í Danmark hava sølutølini hjá bløðunum ikki verið serliga góð tey seinnu árini, og tí er kappingin skerpað rættuliga nógv, tá tað ræður um ítróttartilfarið.

Søgurnar tær seinastu vikurnar um málverjuplássið í FCK og um Jákup Mikkelsen og hansara fótbóltsframtíð hava verið góð dømi um hetta. Í fyrradagin stóð fyri triðju ferð at lesa á heimasíðum hjá bløðunum, at Jákup Mikkelsen var á veg til Onglands at royndarvenja. Jákup var í Danmark í fyrradagin, og Jákup hevur ikki verið í Onglandi. Vit hava skilt á lagnum, at tað er rætt, at Jákup hevur verið tætt við at skriva sáttmála við okkurt felag í næstbestu donsku deildini, og at hann samstundis hevur umhugsað tilboð úr útlandinum.


*Í gjár gjørdist greitt, at Jákup Mikkelsen og Todi Jónsson ikki verða liðfelagar komandi kappingarár*

Í síðstu viku nevndu vit, at onkur av donsku fjølmiðlunum visti fyri vist at siga, at pólverski málverjin hjá Viborg var á veg til FCK. Tað vísti seg, at einki var í hesum tíðindunum.

Í fyrradagin vóru stóru tíðindini í BT, at eykalandsliðsmálverjin, Peter Kjær, var á veg úr Silkeborg og til FCK. Samstundis var lagt afturat, at hetta var partur í býtishandli. Silkeborg skuldi keypa FCK álopsmannin, Heine Fernandez, sum longu í 1994 var við til at tryggja Silkeborg DM heitið. Heine, sum undan summarsteðginum ikki megnaði at tryggja sær fast pláss í FCK álopinum – Zuma og Todi vóru honum ov boysnir – segðist skula lyfta arvin í Silkeborg eftir Henrik Tømrer Petersen, sum er farin til Bolton.

Men seinnapartin í fyrradagin vísti tað seg, at talan var um fjølmiðla fusarar. Tað er einki serligt fyri fjølmiðlarnir. Í staðin fyri at vera mettir sum fjølmiðlar, sum eru fyrstir við síðstu tíðindunum, so verða teir stempladir fyri at bera ósannar søgur.

Soleiðis endaði langa søgan um málverjuplássið í FCK. Á tíðindafundinum mánadagin var einki sagt um, hvussu nógv nýggi svenski málverjin er keyptur fyri, og hvat hann fer at fáa í løn. Brann og FCK eru samd um, at hetta skal haldast loyniligt, men tað er neyvan við síðuna av, tá vit siga, at árslønin fer at vera omanfyri eina millión krónur.

**jh**

# FM í snartalvi 2001

**Komandi leygardag verður føroyameistarin í snartalvi funnin. Telvað verður í Kommunuskúlaskálanum og byrjað verður kl. 13.00.**

## Føroyameistarar í snartalvi seinastu 5 árini

1996: Torbjørn Thomsen
1997: Carl Eli Nolsøe Samuelsen
1998: IM John Rødgaard
1999: Eyðun Nolsøe
2000: Finnbjørn Vang

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Hetta er á øðrum sinni at FM í snartalvi verður telvað um summarið. Í fjør eydnaðist tiltakið avbera væl og tí verður sami háttur royndur aftur í ár. Tó er ikki fastlagt at soleiðis verður á hvørjum ári, eftirsum tað er upp til einstaklinga FM-vertirnir at avgera.'

### Klaksvíkingar vinna

Rákið seinastu tvey árini hevur víst at klaksvíkingar duga sær í snartalvi. Í 1999 vann Eyðun Nolsøe FM-heitið eftir harða kapping við annan klaksvíking, Ólavur Simonsen. Í fjør vann klaksvíkingurin Finnbjørn Vang rímiliga klárt framanfyri tveir aðrar klaksvíkingar, nevnliga Rana Nolsøe og Ólavur Simonsen og havnarmannin Carl Eli N. Samuelsen. Tað sæst tí at teir har norðuri eru væl fyri tá snartalv viðvíkur. Ivaleyst hava tær mongu snarkappingarnar teir hava í talvfelagnum sett síni spor.

Væntandi verða hesir nevndu telvarar við at seta sín dám á kappingina. Nógvir av okkara talvútisetum eru eisini heima í hesum døgum, og ætla teir helst eisini at gera ein vørr.

Snartalv er undirhald, eingin ivi um tað. Tað gongur skjótt fyri seg, hægst 10 minuttir tekur eitt snartalv, og tí kunnu eisini minni serkøn innan talv taka lut. Í klubbum, barrum, heima við hús, á skipum, allaðstaðni verður snartalv telvað. Nú komandi leygardagin finna vit sostatt føroyameistaran á hesum øki og er hesin tittul nógv virdur millum telvarar

### Favorittar

Skal ein velja nakrar favorittar kemst ikki uttanum núverandi føroyameistaran Finnbjørn Vang. Eisini er Ólavur Simonsen tiltikin snartelvari, eins og Nolsøebeiggjarnir eru. Havnin eigur eisini nógvar góðar snartelvarar og sjálvandi hava teir ikki hug at geva øll steypini til norðoyingar, men ringt verður kortini at syfta og basa klaksvíkingar. Kollfirðingurin Torbjørn Thomsen hevur fyrr vunnið Snar-FM og verður hann við, ja so fáa hinir kappingarneytarnir úr at gera.

Telvað verður í einum stórum opnum bólki. 11 dupultumfør verða telvd, tað vil siga at hvør fáa eitt hvítt og eitt svart ímóti mótstøðumanninum, soleiðis at øll telva 22 talv tilsamans. Tilmelding er á staðnum og øll ung sum gomul, roynd sum óroynd eru hjartaliga vælkomin.

Byrjað verður kl. 13.00 og umleið á nátturða verður steypahandanin og virðislønir lætnar. Kostnaður er 75 kr. fyri vaksin og 50 kr. fyri unglingar yngri enn 17 ár. Luttøkugjaldið verður alt nýtt til virðislønir sum tískil vera góðar.

gult25 cyan25 magenta25 svart25




## Sethús í Havn til sølu



Um hóskandi boð fæst selja vit sethúsini á Heygsmannavegi 9. Húsini eru í 2 hæddum og bygd í 1967. Áhugað kunnu venda sær til

**Advokatskrivstovuna Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. Fríða Patursson, adv. Christian Andreasen, adv.
Magnus S. Petersen, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

## Kvilt hárfríðkan

søkir eftir dugnaligum og kreativum næmingi at byrja tann 15. juli.

Hevur hetta tín áhuga, so ring til okkum.

**Kvilt hárfríðkan**
Tlf. 316362

## Stranda Skúli

Søkt verður eftir 1 sáttmálasettum lærara í tíðaravmarkað starv, skúlaárið 2001/2002.

Starvið er 26 t/v, harav 6 tímar eru undirvísing í dreingjaítrótti.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 25. juli 2001.

**Sjóvar sóknar skúlanevnd**
Mass Djurhuus,
tlf. 448338 / 214722,
494 Innan Glyvur

## Summarferia

Vegna summarferiu er kommunuskrivstovan bert opin frá kl. 13–15 í tíðarskeiðnum frá 9. juli – 13. august.



**Runavíkar býráð**

## Fólk til goymsluna

Søkt verður eftir einum fólki til goymsluna í Keypssamtøkuni í Hoyvík, at byrja beinanvegin, ella skjótast tilber.

Tann, ið settur verður, má vera røkin og álítandi og hava vanligt koyrikort. Tað er ein fyrimunur, men eingin treyt, um viðkomandi hevur royndir sum goymslufólk og hevur lokið trukkskeið.

Talan er um fulltíðarstarv. Løn sambært sáttmála við Havnar Arbeiðsmannafelag.

Meira fæst at vita um starvið hjá Bent Lundsgaard, tlf. 314149.

Umsókn skal sendast til FK Hoyvík, Box 349, 188 Hoyvík.

**Keypssamtøkan í Hoyvík**

## Tímalærarastørv á Føroya Læraraskúla

Á Føroya Læraraskúla, sum hevur læraraútbúgving og pedagogútbúgving, er tímalærarastarv í handarbeiði og evning leyst at søkja komandi skúlaárið:

Starvið er umleið 10 tímar um vikuna.

Starvið verða sett frá 1. august 2000.

Umsøkjarar skulu skjalprógva neyðugan undirvísingarførleika.
Innlit og royndir í undirvísing á lærara- og pedagogútbúgving eru ein fyrimunur.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Magistarafelag Føroya og Føroya Landsstýri.

Áhugað, sum vilja vita meira, kunnu seta seg í samband við Paula Nielsen, rektara, tlf. 424242, teldupostsamband paulini@flsk.fo

Umsóknirnar skulu stílast til

**Føroya Læraraskúla,**
Postrúm 348,
FO-110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er úti 31. juli.

## Summarferia

Bókasavnið er stongt vegna feriu frá 16. juli til 20. august.

**Vágs Bókasavn**

## Søkt verður eftir framleiðsluleiðara

Vit søkja eftir einum framleiðsluleiðara til mjøldeildina á Havsbrún. Vit kunnu bjóða eitt spennandi arbeiði í einum dynamiskum umhvørvi, har menningin gongur við rúkandi ferð.

**Arbeiðsuppgávur:**
Ábyrgd av framleiðsluni av fiskamjøl og lýsi, herundir ábyrgdina av:
- operatørum og framleiðslustarvsfólkum
- støðugt at optimera framleiðsluna
- at framleiðslutólini eru í góðum standi
- at góðskukrøvini verða hildin
- at menna framleiðslu og góðsku á lidnu vørunum

Vit rokna við at tú hevur
- eina holla, tekniska útbúgving
- kunnleika til maskinur og teldur
- góð samstarvsevni

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 13. august 2001. Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at ringja til okkum.

**Pf. Havsbrún**
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 414400 · Fax 414401
Mail: bep@havsbrun.fo

## Útbúgving í samskifti, skipan og leiðslu

**Føroya Læraraskúli og Jydsk Pædagogisk Center skipa í felag fyri útbúgving í samskifti, skipan og leiðslu. Útbúgvingin verður á Føroya Læraraskúla.**
**Sama útbúgvingin verður í Danmark skipað sambært lóg um "Åben uddannelse".**

Samskifti, skipan og leiðsla er útbúgving fyri øll, sum arbeiða við pedagogiskari leiðslu, t.d. á dag- og bústovnum. í útbúgvingarverkinum, í almennaverkinum o.s.fr.. Útbúgvingin varar 240 tímar, og er skipað í 7 eindir, sum hvør varar 5 dagar. Umleið tríggjar vikur eru millum hvørja eindina. Útbúgvingin er skipað við støðugum skifti millum ástøðiliga og praktiska vitan, og hon endar við próvtøku. Útbúgvingin byrjar 10. september 2001.

Kostnaðurin fyri allar 7 eindirnar er 9.000,- kr. Tá er kaffi og døgurði uppií prísinum.

Tey, ið hava áhuga í útbúgvingini, kunnu seta seg í samband við Paula Nielsen, rektara á Føroya Læraraskúla, tlf. 424242, at fáa meira at vita.

Hyggið eisini í heimasíðu okkara www.flsk.fo

Tilmelding skrivliga, annaðhvørt við postbrævi ella teldubrævi til Føroya Læraraskúla innan 20. august 2001.

**Føroya Læraraskúli,**
Frælsið 20,
Postrúm 348,
FO-110 Tórshavn
E-mail: flsk@flsk.fo